# Prikkafiskur er allastaðni í føroyskum sjógvi

**Bjarti Thomsen, sum í fleiri ár hevur starvast á Fiskirannsóknarstovuni, hevur fingið til uppgávu at kanna tilfar og gera metingar um møguleikarnar at veiða prikkafisk í føroyskum sjógvi**



*Henda fyrsta royndin eftir prikkafiski gav ikki nógv, men hon staðfesti, at hesin fiskur er allastaðni í føroyskum sjógvi*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Í síðstu viku gjørdi nótaskipið, Christian í Grótinum, eina roynd at veiða prikkafisk undir Føroyum. Nøgdirnar, sum nótaskipið fekk, vóru smáar, men Bjarti Thomsen, sum var við fyri Fiskirannsóknarstovuna, sigur, at henda fyrsta royndin staðfestir, at prikkafiskur er allastaðni í føroyskum sjógvi.

Reiðaríið hjá Christiani í Grótinum bar allan kostnaðin av royndini. Teir fóru út týskvøldið í síðstu viku og vóru inni aftur sunnudagin á døgurða.

Bjarti Thomsen, sum hevur drúgvar royndir á Fiskirannsóknarstovuni, var við hendan túrin. Í seinastuni hevur hann verið úttanlands og lisið, men stovnurin hevur heitt á hann um at kanna ymiskt tilfar í samband við veiðina eftir prikkafiski og gera metingar um møguleikarnar at veiða hetta fiskaslag í føroyskum sjógvi.

### Trolið riggaði væl

Bjarti sigur, at eitt flótitrol varð riggað til hesa fyrstu royndina, og tað vísti seg, at trolið riggaði væl.

– Hetta var eitt svartkjaftatrol, sum partvís var sett saman við einum lodnutroli, soleiðis at meskarnir har afturi í posanum vóru niður í 20 mm. til støddar.

Christian í Grótinum hevði sjey tóg tilsamans á túrinum, og tá ið mest var av prikkafiski uppi svartkjaftinum, var talan um 2,5 % av veiðini.

– Men hetta vóru stutt tóg, og í hesum førinum vóru 12 tons av svartkjafti í trolinum, sigur hann.

Umborð á Christiani í Grótinum høvdu teir ymiskar upplýsingar um prikkafisk, og tí valdu teir at gera royndir suður ímóti markinum og vestur móti markinum til Íslands.

– Vit hava eisini útvegað okkum nakað vitan um fiskin, og tí royndu vit eisini í Hetlandsrennuni.

### Fekst allastaðni

Bjarti vísir á, at hetta var tann fyrsta føroyska royndin eftir prikkafiski, og hóast nøgdirnar vóru smáar hesaferð, er staðfest, at prikkafiskur er allastaðni í føroyskum sjógvi.

Eini 4-5 ymisk sløg eru av hesum fiski. Mest vanliga støddin liggur millum 11 og 13 cm., men tað eina slagið verður einar 18 cm. til støddar.

– Prikkafiskur var í flestu tógum, vit høvdu á túrinum, sigur Bjarti Thomsen.

Hann vísir á, at nótaskipini hava víst áhuga at gera royndir eftir prikkafiski, og væntast kann, at ein ella tvær royndir aftrat verða gjørdar nakað skjótt.

Tað er Fiskimálastýrið, sum skal geva loyvi til hesar royndir, og tað verður vanliga gjørt í samráð við Fiskirannsóknarstovuna.

Stovnurin hevur nú heitt á Bjarta Thomsen, sum áður hevur fingist nógv við eitt nú búrfisk, um at útvega tilfar um prikkafiskin.

Higartil í ár siga russar seg hava fiskað stívliga 7000 tons av prikkafiski undir Føroyum.



*4-5 sløg av prikkafiski eru at fáa í føroyskum sjógvi. Vanliga støddin er 11-13 cm., men tann størsti verður 18 cm. langur*

# Stórt dansitiltak í Mentanarhúsinum

**Silly Boys, Absurdy Fair og nýggi bólkurin, Atlas, fara at spæla til dans í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, 25. og 26. oktober**



*25. og 26. oktober verður Mentanarhúsið í Fuglafirði aftur karmur um stórt dansitiltak, tá ið farið verður aftur í seksti-og sjeytiárini*

DANSITILTAK
*Vilmund Jacobsen*

Fuglafjarða Hornorkestur skal hava nýggj ljóðføri. Í hesum sambandi hevur orkestrið skipað fyri ymiskum tiltøkum, sum skulu vera við til at fíggja ljóðførini.

Tað er ræðiliga kostnaðarmikið at gera eitt hornorkestur út – alt eftir, hvussu nógvir tónleikararnir eru. Í Fuglafirði rokna tey við, at hornorkestrið skal hava nýggj ljóðføri fyri einar 250.000-300.000 krónur. Er hinvegin talan um eitt av teimum stóru hornorkestrunum, sigst, at ljóðførini kunnu kosta hálva milj. krónur, og tað er nógvur peningur.

### Aftur í seksti- og sjeytiárini

Seinastu árini hevur verið alt meira vanligt at leita uppaftur gomlu tónleikabólkarnar og fáa hesar at spæla til dans. Hetta eru væl umtókt tiltøk, sum savna nógv fólk og kunnu geva væl av peningi til teirra, sum skipa fyri.

Jónsvein Poulsen, sum er formaður fyri Fuglafjarða Hornorkestri, sigur, at teimum hevur eydnast at savna gomlu bólkarnar í Fuglafirði, Silly Boys og Absurdy Fair umframt bólkin, Atlas, at spæla til dans hesi bæði kvøldini, 25. og 26. oktober.

– Tað hevur verið trupult at savnað bólkarnar, tí einir tveir teirra, sum hava spælt við, er í Danmark. Nógvir ymiskir dagar hava tí verið á lofti, og ofta er tiltakið flutt. Tað hevur ikki ligið fyri hjá øllum í senn, og tá ið tað lá fyri, var Mentanarhúsið upptikið.

Nú er so endaliga avgjørt, at stóra dansitiltakið verður 25. og 26. oktober.

Jónsvein sigur, at somu bólkar fara at spæla bæði kvøldini, men møguliga verður raðfylgjan ymisk, nær bólkarnir spæla.

– Vit eru spentir til hetta stóra tiltak og vóna, at nógv fara at nýta høvi at koma til Fuglafjarðar at dansa, sigur Jónsvein.

### Eldri og yngri

Dansurin í Mentanarhúsinum er ætlaður bæði teimum eldru, tilkomnu og teimum yngru.

– Hetta verður í fyrsta lagi góður dansitónleikur frá seksti-og sjeytiárunum, og flestum, bæði eldri og yngri, dámar henda tónleikin, sigur Jónsvein, sum sjálvur er við í bólkinum, Atlas.

Spurdur, hvaðani hesin bólkurin stavar, sigur Jónsvein, at hetta eru tónleikarar, sum hava spælt við øðrum bólkum áður.

Sjálvur hevur Jónsvein spælt við Silly Boys. Aðrir tónleikarar í Atlas eru Mourits Mohr, Njál R. Petersen og Eyðun Larsen.

Í bólkinum er eisini ein ungur og evnaríkur tónleikari. Tað er sonur Jónsvein, 14 ára gamli, Jan Rúni Poulsen, ið eitt nú hevur spælt saman við Brandi Enni.

– Atlas hevur spælt til eini 2-3 tiltøk, síðan bólkurin byrjaði, og ætlanin er at halda fram, um onkur vil hava okkum at spæla, sigur Jónsvein Poulsen.

Næsta tiltakið, sum Fuglafjarða Hornorkestur skipar fyri, verður jólakonsertin, sum verður umleið hálvan desember. Møguliga verður hendan konsertin fyriskipað saman við Fuglafjarða Sangkóri. Júst, nær hon verður og hvar, er ikki endaliga avgjørt enn.



Rasmus Rasmussen:

# Harður rokktónleikari vísir eina spildurnýggja síðu



*Rasmus Rasmussen, sum er kendur frá nógvum ymiskum tónleikabólkum í Føroyum, gevur í dag sína fyrstu solo-fløgu út*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Rasmus Rasmussen, sum millum annað er kendur frá bólkunum Diatribes, Happy?, Makrel og Flux, gevur í dag eina solo-fløgu út. Á hesi fløguni vísir tónleikarin, sum annars er kendur fyri harðan og skitnan rokktónleik, eina heilt aðra síðu av sínum tónleiki**

TÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

Sjálvur kallar Rasmus tónleikin á fløguni fyri melodiskan, myrkan rokk. Tónleikurin er ikki harður og ráur, sum tónleikurin bólkarnir, Rasmus hevur verið við í, spæla.

– Grundirnar til, at eg eri farin í gongd við eina slíka verkætlan eru nógvar. Tá ein spælir við í einum orkestri, noyðist ein semjast um, hvat bólkurin vil spæla, og tá fær ein ikki allan sín egna tónleik fram, sigur 22 ára gamlir Rasmus Rasmussen, sum í dag gevur sína fyrstu solo-fløgu út.

Rasmus heldur, at hetta er ein góður máti at vísa aðrar síður av tónleikadygdum sínum fram, og harvið eisini vísa tað slagið av tónleiki, sum hann ikki spælir í bólkunum fram.

### Egin løg

11 løg eru á fløguni, sum kallast Implosive. Rasmus hevur sjálvur skrivað øll løgini, og hann spælir eisini tónleikin á øllum løgunum. Harafturat hevur Rani Christiansen hjálpt honum við trummuslátturi í trimum løgum, og Belinda í Haraldsstovu og Rasmus syngja duett í einum lagi.

– Eg eri væl nøgdur við fløguna nú. Tað hevur tikið mær umleið hálvt annað ár at gera hana. Sjálvur haldi eg ikki, at hon líkist nøkrum øðrum tónleiki, so um hon ger, so er tað ikki við vilja.

Rasmus Rasmussen spælir sjálvur gittar. Hann hevur spælt gittar síðani hann var eini 10 ára gamal.

– Henda verkætlanin byrjaði við, at eg gav Kristian Blak eitt demo band við bara gittartónleiki, men so hvørt, sum eg havi arbeitt víðari, so hava onnur ljóðføri sníkt seg upp í. Millum annað er hetta fyrsta ferðin eg havi spælt bass, keyboard og percussion, greiðir Rasmus frá.

Tutl gevur fløguna hjá Rasmusi út. Hon er nummar 93 í røðini av rokkfløgum, og fegnast felagið yvir tað stóru framgongd, sum hevur verið innan rokktónleik í Føroyum tey seinastu árini.

### Ísland

Implosive skal eftir ætlan eisini marknaðarførast í Íslandi. Tá Makrel var við í tónleikakapping yviri í Íslandi fyrr í ár, gjørdist bólkurin nummar trý, og Rasmus var kosin til besta gittarleikara í allari kappingini. Og tað er júst hetta, sum Tutl og Rasmus ætla at brúka. Longu mánadagin verður fløgan í Íslandi.

Rasmus yrkir bara á enskum.

– Eg haldi, at tað riggar best hjá mær at yrkja á enskum, men hóast tað, so hevur tað ikki so stóran týdning. Hevði eg dugað betri, at yrkt á føroyskum, so hevði eg gjørt tað, men tað fellur mær léttari at yrkja á enskum, eftir sum eg næstan bara lurti eftir enskum tónleiki.

Fløguhúsan hava Niels Arge Galán og Uni Árting gjørt. Rasmus er væl nøgdur við fløguhúsan sum sær ógvuliga snøggur út.

– Teir hava gjørt nógvar føroyskar fløguhúsar, og eg haldi, at teir eru tveir av teimum í Føroyum, sum duga best at gera fløguhúsar, heldur Rasmus.

Fløgan kemur út í søluбúðirnar í dag. Stuðlað útgávuni hava Mentanargrunnur Landsins, Mentamálaráðið og Fjølrit.